


**Soul Made**

Tvey ymisk turrikløð til konufólk frá Soulmade. Annað er grátt við eyðkendu stjørnuni, sum gongur aftur í vetrarkollektiónini frá Soulmade. Seymað av jerseytoyi og frinsað. Prísur: 899,-
Hitt er er maskinbundið við 10% cashmere og frynsað. Prísur: 1499,-

Fáast á netinum www.soulmade.nu og í Sirri á Áarvegnum



# Turrikløð

## TÍBETUR FYRI ALLAR KULDAKRÁKUR, ERU TAÐ Í HEYST OG VETUR MODERNAÐ AT VEVJA SEG INN Í STÓR TURRIKLØÐ

Turrikløð eru bókstaviliga ein av heitastu trendunum, og fleiri av føroysku sniðgevunum hava eitt breitt úrval av turrikløðum úr ymsum tilfari og í ymsum sniði. Tað skuldi tí borið øllum til at funnið eitt hóskandi turriklæð av føroyskari framleiðslu, um so er, at tú ikki ert kring við stokkunum sjálv. Her eru nakrar av heyst og vetrarvørunum frá Soulmade, Guðrun&Guðrun, elsabech og Steinum.









**elsabech**

Sonevnd rør-turrikløð frá elsabech seymað av ymsum toysløgum, og seymað saman í endunum. Nógv ymisk sløg av toyi og litsamansetingum bæði til mannfólk og konufólk.
Prísur: 599,-

Fáast á netinum á www.elsabech.dk og í handlinum »Super« í Handilskjarnanum í Havn





**Steinum**

Bundið turriklæði og húgva við eyðkendu, glaðu litunum frá Steinum til bæði mannfólk og konufólk. Nógv ymisk mynstur sett saman við sterkum litum. Turriklæðið er frinsað. Turriklæðið kostar 1099,- kr. Húgvan í sama stíli kostar 499,-

Fæst í Sirri á Áarvegnum í Havn. Meiri sæst á www.steinum.net

**Guðrun&Guðrun**

Oversize bundin turrikløð til konufólk og mannfólk.
Ljósagrátt turriklæð við holmynstrið í endunum og frynsum úr mohair.
Prísur 1180,-
Svart og myrkagrátt turriklæði, sonevnt Ull Art, har fleiri bindingarhættir eru nýttir fyri at skapa eitt rátt úttrykk og eitt heilt serligt spæl.
Prísur 1180,-

Fáast hjá Guðrun&Guðrun á Áarvegnum í Havn og á netinum www.gudrungudrun.com

MYND: WWW.PLAGG.FO